## DAGSINS MEINING

# Eitt gott mál

Á fundinum fyrr í vikuni um útflutning av óvirkaðum fiski legði løgmaður fram visión samgongunnar fyri føroyska samfelagið. Sambært hesi visión hevur landsstýrissamgongan sett sær sum mál, at Føroyar um 15 ár skulu vera millum heimsins fremstu lond. Hetta er eitt gott mál at seta sær og øll kunnu taka undir við einum slíkum máli. Soleiðis sum samfelagsgongdin er um allan heim, er neyðugt hjá einihvørji stjórn at seta sær eitt mál og at hava eina strategi á øllum samfelagsøkjum fyri at náa hesum máli.

Í framløgu síni nam løgmaður við flestu av teimum evnum, sum eru uppi í tíðini. Eitt hitt heitasta evnið er altjóðagerðin. Henda tilgongd fevnir um vandar og møguleikar. Vandarnar finna vit í hesum, at heimurin er vorðin ein arbeiðsmarknaður. Hetta merkir, at framleiðslan fer har, sum kostnaðurin er lægstur, eitt nú Kina. Henda støða er ein stór avbjóðing til vinnulív og myndugleikar. Arbeiðspláss í túsundatali verða nú flutt til Kina, har tímalønin bert er ein brotpartur av tímalønini t.d. í Norðurlondum ella í Týskland. Tað er øllum greitt, at henda tilgongd gevur myndugleikum stórar trupulleikar, tí úrslitið av gongdni er vaksandi arbeiðsloysi.

Tað eru tó ymisk viðurskifti, ið kunnu mótvirka hesi gongd. Kina er eitt nú av álvara farið undir at endurskoða allar tær skattalættaskipanir, sum eru við til at draga útlendskar fyritøkur til Kina. Tað hevur gingið ov skjótt og vinningurin fyri kinesiska samfelagið av mongu útlendsku íløgunum er lítil og eingin. Hetta merkir, at íløguhugurin í vesturheiminum við atliti at Kina fer skjótt at minka. Eftir verður so hóttanin frá lága lønarlagnum, sum vit einki fáa gjørt við. Tað einasta, vit kunnu gera, er at broyta vinnumynstur og síggja til, at vit fáa meira burturúr tí fiskiríkidømi, sum vit eiga. Hetta leiðir til positivu avleiðingarnar av altjóðagerðini.

Altjóðagerðin merkir eisini møguleikar. Men fyri at kunna troyta hesar møguleikar er neyðugt við nýhugsan, nýskapan og kreativiteti - ikki bert í vinnulívinum men í øllum samfelagnum. Meginfortreytin fyri at kunna taka við avbjóðingini liggur í eini miðvísari og sterkari satsning uppá útbúgving og gransking. Útbúgving og gransking eru fortreytir fyri nýskapan og fyri, at vit skulu megna at troyta møguleikarnar, sum altjóðagerðin ber við sær. Løgmaður og hansara samgonga noyðast tí at leggja á annan bógv, tá um útbúgving og gransking ræður. Her skal heilt onnur bót gerast út á súpanina. Í staðin fyri sum nú at spara og skerja útbúgving og gransking eigur hetta økið at verða høgt raðfest. Hetta merkir í fyrstu atløgu, at nógv meira peningur skal játtast í framtíðini og hetta merkir, at skúli og útbúgving eiga at verða raðfest nógv hægri enn í dag. Hetta er galdandi fyri alt økið - frá barnagarði til hægru lærustovnarnar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Anfinn Kallsberg danskur ráðharri!

**Kann tað hugsast at Anfinn Kallsberg, fólkatingsmaður, fær tilboð um at gerast ráðharri í nýggju donsku stjórnini, við Norðuratlandsøkjunum sum málsøki**



**Ísak Mikladal**

Politikkur er millum annað at hava dirvi at ganga nýggjar leiðir, tora at taka við avbjóðingum, bjóða seg fram og til einhvørja tíð at virka fyri heilum loysnum.

Tað er eingin loyna at Anfinn Kallsberg er ein av royndastu politikarunum sum vit hava í løtuni. Hann er viðurkendur her á landi og í Danmark fyri at søkja semjur, samanhald og at fara eftir so breiðum politiskum loysnum sum gjørligt. Eisini er hann ein virdur politikari millum donsku starvsfelagar sínar, bæði teir í andstøðu og samgongu.

Spurningurin er, um hetta ikki júst er rætta løtan at ganga heilt nýggjar leiðir, fyri at loysa upp og fyri at fáa eina endaliga og varandi loysn á viðurskiftunum millum norðuratlantsøkið Føroyar/Grønland og Danmark.

Er tað hugsandi, at politiska leiðslan í Danmark við Anders Fogh Rasmussen á odda fer at bjóða royndum føroyskum politikara at umsita málsøkini viðvíkjandi Norðuratlandsøkjunum á Fólkatingi? Við tí fyri eyga at fáa eina breiða politiska loysn á málinum viðv. ríkisfelagsskapinum - og harvið fáa málið loyst innanífrá heldur enn við áhaldandi trýsti útifrá. Tað sær tíverri út til, at danir hava ilt við at koma víðari, meðan íblástur útifrá hevði helst tænt málinum best.

Á nýggju ráðharrastovuni kundu bæði donsk og føroysk/grønlendsk embætisfólk starvast, á tann hátt høvdu eisini føroyskir og grønlendskir serfrøðingar, saman við donskum embætisfólkum, havt møguleika fyri at tilevna neyðug tilmæli og álit eins og at vegleitt ráðharran.

Um Anfinn Kallsberg og Fólkaflokkurin ikki bjóða seg fram, tí teir meta hetta at blanda seg uppí danskan politikki, er tó umráðandi at teir eru fyri sjálvum tankanum og til reiðar um møguleikin gerst veruleiki. Harnæst er neyðugt at Føroya- og Grønlendska Landsstýrið vísa jaligan hugburð og eru við í møguligum tilevning av konseptinum, hevði hildið at bæði føroyska og grønlendska fólki vildu staði aftanfyri Anfinn Kallsberg í einum møguligum nýggjum slóðbrótandi arbeiðið føroyskum og grønlendskum viðurskiftum at frama.

# Áheitan á okkara fólkatingsumboð um at krevja, at flogvøllurin verður útbygdur nú

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður*



Nú valstríðið er lokið, byrjar arbeiðið Annfinn Kallsberg og Høgni Hoydal.

Eg fari at biðja tykkum báðar sum fólkatingsumboð um at bera so í bandi, at til í tykkara "åbningstale" so miriliga heita á stjórnina um at fáa útbygt Vága floghavn til 1800 metrar sum skjótast.

Stór skomm er, at staturin ikki hevur røkt sína uppgávu á hesum øki meira nøktandi.

Eg haldi, at rætta staðið at nevna hesi viðurskiftir er fólkatingsins talarastólur - umframt, at landstýrið sjálvandi eisini er áhugað í at ein útbygging verður framd sum skjótast.

Enn einaferð: Tillukku við valinum. Royni at nýta ríkisfelagsskapin positivt til gagn fyri Føroyingar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.